# Bíblian innblást av Gudi - ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN



**Tólvti partur**

Teir flestu jødar trúgva ikki á Jesus, sum Messias. Teir hava ikki fingið eyguni upp fyri tí, sum Gamla Testamenti so mangar staðir talar um hann, sum frelsara hjá øllum heimsins tjóðum. Ikki bert hjá jødum. Til dømis 1. mósebók 12,3: Eg skal signa tey, ið signa teg, og tann, ið tær bannar, honum skal Eg banna; og í tær skulu allar ættir á jørðini verða signaðar.

Og Esaias 49,5-6: Og nú sigur HARRIN, sum frá móðurlívi hevur gjørt Meg til tænara Sín, til at leiða Jákup aftur til Sín og savna Ísrael fyri Seg - og Eg eri dýrmætur í eygum HARRANS, og Gud Mín er vorðin styrki Mín -

Hann sigur: "Tað er ov lítið, at Tú ert tænari Mín til at fáa ættir Jákups aftur á føtur og leiða heimaftur hina frelstu leivd Ísraels - nei, Eg skal gera Teg til ljós heidninga, so frelsa Mín kann náa at enda jarðarinnar.

Og Esaias kap. 53, ikki minst. Hesin kapitulin talar um hin líðandi Messias. Hann er skjótur at lesa, men her skulu vit bert nema við fimta vers: Men Hann varð særdur fyri brot okkara, soraður fyri misgerðir okkara; straffin varð løgd á Hann, so vit skuldu hava frið, og við sárum Hansara eru vit grødd.

Eg skal siga frá eini søgu í samband við hetta versið. Eg kom nógv út til Søldafirðar sum smádrongur og ungur. Har var ein maður, Andrias at hann, sum plagdi at vitna á møtunum í salinum. Hann fortaldi fleiri ferðir hesa søguna. Tað var umborð á einum skipi, at skiparin legðist sjúkur, og hann gjørdist greiður yvir, at tað var álvarsamt, og at hann fór at doyggja. Hann sendi so boð eftir 1. stýrimanni og spurdi hann, um hann kundi hjálpa sær, so hann kundi finna frið við Gud. Men 1. stýrimaður kundi ikki hjálpa honum við hesum álvarsmáli. So var sent boð eftir øðrum, men eingin var førur fyri at hjálpa. Til endan kom yngsti maður umborð upp, ein ungur drongur. Hann las Esaias 53,5 fyri honum og segði, at mamma hansara plagdi at lesa tað fyri sær soleiðis, at hon setti hansara navn inn í versið. Drongurin spurdi skiparan, um hann skuldi lesa tað fyri honum uppá tann mátan. Jú tað vildi skiparin. So las drongurin: "Hann varð særdur fyri skiparans skuld, soraður fyri misgerðir skiparans, straffin varð løgd á hann, fyri at skiparin skuldi hava frið, og við sárum hansara er skiparin grøddur. Í hesum fann hesin doyggjandi maður frið við Gud. Hevur tú nakrantíð roynt at seta títt navn inn har? Royn tað!

**Framhald**

# Svar til Sjúrð Olsen, býraðslim í Havn

MARIN KATRINA FRÝDAL
býráðslimur forkvinna í teknisku nevnd hjá Tórshavnar býráð



Sjúrður Olsen, býráðslimur í Havn, hevur í Sosialinum í 14. febr. eina viðmerking til eina samrøðu, ið Sosialurin hevði við meg 12. febr. um ferðslutrupulleikar á Velbastað, og um ónøgd foreldur á Hvítanesi orsaka broyttu ferðaætlanini hjá Bussleiðini.

Fyri at taka afturíaftur tey ítøkiligu málini er stutt at siga, at trupulleikin hjá skúlabørnunum á Hvítanesi vónandi skuldi verði loystur á ein nøktandi hátt við teimum justeringum í nýggju koyritíðunum, sum verða gjørdar nú og fram til 1. mars. Trupulleikin á Velbastað er tíverri ikki loystur enn. Kinkur kom í tað málið orsakað av ymiskum áskoðanum millum Landsverk og kommununa um ábyrgdina av nevnda vegastrekki. Síðani er málið komið í drag, men vónandi fæst tó ein nøktandi loysn á hesum máli nú í vár.

Tað er ógvuliga løgi, at Sjúrður einki kennir til hesi mál, tí tey hava verið til viðgerðar í teknisku nevnd, har Sjúrður er nevndarlimur; og tað eina málið hevur enntá fingið fleiri viðgerðir.

Sjúrður sigur seg heldur einki vita um ta vanlukkuligu støðu, sum tekniska umsitingin er í orsakað av viðvarandi og munandi undirmanning, tí kvalifiserað fólk ikki fæst at søkja tey mongu ósettu størvini. Hendan støðan inniber m. a., at einki fólk longur er burturav at taka sær av ferðsluspurningunum í kommununi. Ja Sjúrður sigur enntá, at hesi viðurskifti eru tað reina tvætl. Sjálv meti eg tó hendan trupulleikan við stóra mannfallinum í teknisku umsitingini somikið álvarsaman, at eg havi viðgjørt og reist málið í nevndini. Síðani Sjúrður heldur ikki hevur fingið hetta við, kundi man nærum farið at hildið, at maðurin situr í øðrum tonkum á nevndarfundunum.

Eisini finnist Sjúrður at øktu útreiðslunum til umsitingina. Eitt av málunum hjá núsitandi meiriluta í Tórshavnar býráð var júst at styrkja um umsitingina. Hetta var alneyðugt, og átti at havt verið gjørt fyri nógvum árum síðani, soleiðis at kommunan hevði verið tilreiðar at taka ímóti øktu uppgávunum í kjalarvørrinum av kommunusamanleggingunum. Kommunan er vaksin ómetaliga nógv í vavi seinnu árini, og hetta krevur eina munandi fyrisitingarliga røkt. Sum høvuðsstaðarkommuna skal og eigur Tórshavn at vera tann førandi. Kommunan hevur ógvuliga tilvitaðar borgara, ið bert er at fegnast um, men tað setur eisini krøv til tænastustøðið frá umsitingini.

Men tað var ein øgiligur goragangur av býráðsminnilutanum, tá ið fíggjarætlanin hjá Tórshavnar kommunu fyri 2008 var til viðgerðar, og nógvar vóru atfinningarnar um hækkanina til kommunalu umsitingina. Nei, Sjúrður, ein munandi uppraðfesting av kommunalu umsitingini átti at havt verði gjørt fyri nógvum árum síðani, so sótu vit ikki í hesu vanlukkuligu støðuni í dag. At byggja upp eina góða, sterka og vælvirkandi umsiting gerst ikki eftir einum degi, nei tað tekur nógv ár, og krevur somuleiðis tann neyðuga peningin.

Ferðslutrupulleikar í kommununi, ið hava átrokandi tørv á at verða loystir, eru mangir, bæði av meira yvirskipaðum og strukturellum slagi, men sanniliga eru eisini ein rúgva av sokallaðum"brandsløkkingaruppgávum". Ferðslutrupulleikar á Hvítanesi og á Velbastað eru úr tveimum av bygdunum í Tórshavnar kommunu, og hesir eru tíverri als ikki nøkur eindømi í somáta. Í teknisku nevnd eru vit vorðin kunnað um m.a. teir stóru og álvarsligu ferðslutrupulleikarnar á bygdarvegnum í Kollafirði, ið borgararnir har hava gjørt vart við fleiri ferðir. Nevndin tekur trupulleikarnar í álvara, og vónar at hava eina nøktandi loysn í ár.

# Á uttanríkispolitiska pallin við proppum í oyrunum

EDMUND JOENSEN
fólkatingsmaður



Nýggi uttanríkisráðharrin hjá føroyska heimastýrinum vil ikki fyrihalda seg til mest týðandi uttanríkispolitiska spurningin: ES-limaskap til Føroya.

Bert fáar dagar inni í nýggja samgonguskeiðinum hevur uttanríkisráðharrin hjá føroyska heimastýrinum sett sera óheppið út í kortið uttanríkispolitiskt – við bindi fyri eyguni og proppum í oyrunum.

Tað kom fram í útvarpstíðindasendingini hjá Kringvarpinum mánakvøldið 18. februar kl. 18.00. Í sendingini segði Høgni Hoydal, landsstýrismaður, seg ikki kunna gera viðmerkingar til niðurstøðuna frá einum fundi 4. februar 2008 millum ES-nevndarlimin, Leonard Orban, og undirritaða.

Høvuðsniðurstøðurnar frá fundinum vóru hesar:

Europasamveldið er møguliga sinnað at finna eina smidliga loysn, um Føroyar vilja nærkast samveldinum.

**Vegurin inn í ES sum fullveldisland er drúgvur og trupul**

Ongar formligar forðingar eru fyri, at Føroyar kunnu gerast fullveldisland, eftir at Føroyar evt. eru vorðnar limir í ES umvegis ES-limalandið Danmark.

Hesar upplýsingar vil uttanríkisráðharrin hjá heimastýrinum ikki fyrihalda seg til.

Í staðin velur hann at sáa iva um samrøðuna millum ES-nevndarlimin og undirritaða. Tað má sigast at vera óseriøs og arrogant framferð í mest týðandi uttanríkispolitiska spurninginum: ES-limaskapur til Føroya.

Kann tað hugsast, at har finst ein smidlig leið fyri Føroyar inn í ES? Er tað møguligt, at sjálvsavgerðarrætturin verður varðveittur, hóast Føroyar vinna sær ES-limaskap umvegis limalandið Danmark?

Hesar spurningar vil landsstýrið ikki fyrihalda seg til. Ongin eftirkanning og ongin grundgeving. Bert proppar í oyrunum og bind fyri eyguni.

Harvið kann eitt sera stórt spurnartekin setast við ES-politikkin hjá samgonguni.

Mítt tilmæli er framvegis, at Føroyar sum skjótast taka upp samrøður við Europasamveldið fyri at kanna møguleikarnar fyri tættari tilknýti til ES og betri atgongd til stóra europeiska marknaðin.

Føroyar hava sum samfelag og vinnutjóð stórliga brúk fyri einum nógv tættari tilknýti til Europasamveldið, enn vit hava í dag. ES er ein góður lykil til altjóða og millumtjóða samstarv, og vit kunnu fáa nógv burturúr t. d. vinnuliga, útbúgvingarliga, granskingarliga og mentunarliga sum heild.

Málið eigur at vera ES-limaskapur við undantøkum, og undirritaði er til reiðar at samstarva við landsstýrið til tess at finna røttu loysnirnar fyri Føroyar

